## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Turrveður við sól av og á. Ættin verður eystan, 5 til 10 m/s, og hitin millum 7 og 10 stig




**Veðrið hósdagin**
Framvegis turrveður, men skýggjað. Vindferðin økist av eystri upp í 8 til 13 m/s, um náttina av eystri og landnyrðingi upp í 15 m/s. Hitin um 8 stig




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Vindur av norðri og landnyrðingi, 10 til 15 m/s, men síðani minkar hann vindin til 5 til 10 m/s av norðri og útnyrðingi. Skýggjað veður við regni ella ælingi. Hitin millum 5 og 8 stig

# Kroyst føroyska flaggið upp í eitt horn

**- Soleiðis sum eg síggi tað, so er hatta flaggið bara eitt súmbol upp á politikkin hjá sitandi samgongu, har allur fullveldis- og sjálvstýrispolitikkur er parkeraður, sigur Annita á Fríðríksmørk úr Tjóðveldisflokkinum um nýggja flaggið, sum varð lagt fram á flaggdegnum**



FLAGGDAGURIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað var Malan Marnersdóttir, sum aftaná flaggdagsrøðuna á Vaglinum í Havn legði fram eitt flagg, har allir partarnir í danska kongaríkinum vóru umboðaðir. Malan Marnersdóttir segði, at hetta er eitt nýtt flagg til eitt nýtt orðaskifti. Og orðaskiftið er farið í gongd, tí Annita á Fríðríksmørk úr Tjóðveldisflokkinum heldur ikki, at veruleikin sæst aftur í nýggja flagginum.

- Um mann vil súmbolisera veruleikan í einum slíkum flaggi, so átta mann at kroyst tað føroyska og grønlendska flaggið upp í eitt horn, og so latið restina vera Dannebrog. Hetta ístaðin fyri at latast sum um, at vit eru javnbjóðis partar í einum ríkisfelagsskapi, sigur Annita á Fríðríksmørk, sum situr í grundlógarnevndini.

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, sigur, at vit hava eitt flagg í dag, og at hann dugir ikki ordiliga at síggja, hvat hugskotið skuldi verið.

- Vit hava eitt flagg í dag, og tað er nokk við tí flagginum, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa fatur á løgmanni Jóannesi Eidesgaard áðrenn evstamark. Nýggja flaggið skuldi handast løgmanni.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -5 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 23 |
| Athen | -- |
| Malta | -- |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 22 |
| New York | 10 |
| Miami | 19 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst yvir Miðskandinavia ferðast spakuliga móti eystri, og gevur framvegis støðugt veður. Hósdagin fer væntandi eitt



brúgvalag, ið dýpist spakuliga, við Skotland at fara framvið sunnanfyri Føroyar og gevur síðani regn og vind.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/4 kl. 06[00]– 26/4. 06[00]. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/4 kl. 06[00]– 26/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 66,7 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

24. apr. Fullmáni
29. apr. Mánin næstur jørðini
1. mai Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26.apríl | 08.43 | 21.07 | 07.43 | 20.07 | 07.58 | 20.22 | 10.43 | 23.07 | 11.43 | - | 06.58 | 19.22 | 05.58 | 18.22 | 08.58 | 21.22 | 09.58 | 22.22 | 08.28 | 20.52 | 09.43 | 22.07 |
| 27.apríl | 09.35 | 22.04 | 08.35 | 21.04 | 08.50 | 21.19 | 11.35 | - | 00.07 | 12.35 | 07.50 | 20.19 | 06.50 | 19.19 | 09.50 | 22.19 | 10.50 | 23.19 | 09.20 | 21.49 | 10.35 | 23.04 |
| 28.apríl | 10.33 | 23.01 | 09.33 | 22.01 | 09.48 | 22.16 | 00.04 | 12.33 | 01.04 | 13.33 | 08.48 | 21.16 | 07.48 | 20.16 | 10.48 | 23.16 | 11.48 | - | 10.18 | 22.46 | 11.33 | - |
| 29.apríl | 11.30 | - | 10.30 | 23.00 | 10.45 | 23.15 | 01.01 | 13.30 | 02.01 | 14.30 | 09.45 | 22.15 | 08.45 | 21.15 | 11.45 | - | 00.16 | 12.45 | 11.15 | 23.45 | 00.01 | 12.30 |
| 30.apríl | 00.00 | 12.30 | 11.30 | - | 11.45 | - | 02.00 | 14.30 | 03.00 | 15.30 | 10.45 | 23.27 | 09.45 | 22.27 | 00.15 | 12.45 | 01.15 | 13.45 | - | 12.15 | 01.00 | 13.30 |

5 707265 100036 >